# ítróttur

Nr. 12 • mikudagur • 19. januar 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo


# Mjølnir vann toppdystin

**Kvinnurnar hjá Mjølnir hava sett nøsina upp eftir greipuni í ár, nú tær hava lagt seg einsamallar á odda í meistaradeildini hjá kvinnum**


FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


Lagt var upp til eitt ordans oddabrak í meistaradeildini hjá kvinnum í flogbólti um vikuskiftið, tá ið TB var og vitjaði Mjølnir í KÍ-høllini. Sum vant, freistast man at siga, møttu klaksvíkingar talsterkir, og karmarnir vóru teir røttu til ein toppdyst.

### Sannførandi sigur

Talan gjørdist tó ongantíð um tann heilt spennandi dystin. Tað vísti seg nevnliga, at Mjølnir á degnum var væl sterkari enn TB, og heimaliðið vann dystin sannførandi 3-0. Bert í tí næsta settinum, sum endaði 25-23 til Mjølnir, var eitt sindur av spenningi í, meðan hini bæði settini vann Mjølnir lættliga.

Úrslitið var sum áðurnevnt 3-0 til Mjølnir, og settúrslitini vóru 25-17, 25-23 og 25-15.

Dysturin var samstundis eitt slag av einum generalprøvu upp á steypafinaluna, sum verður á Hálsi 12 februar, tí tá møtast júst hesi bæði liðini í kvinnufinaluni. Tað man verða lítið at ivast í, at tvørakvinnur ætla at geva klaksvíkingum harðari mótstøðu í steypafinaluni, enn tær gjørdu í Klaksvík í vikuskiftinum.



*ÍF vann ein tryggan sigur, tá tær um vikuskiftið vitjaðu hjá KÍF*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Dráttur vann grannadystin

Á Giljanesi var grannadystur leygardagin, tá ið SÍ vitjaði Drátt. Ungu manningin hjá sørvingum megnaði ikki at gera nakað við tær meiri royndu úr Drátti, sum vunnu dystin 3-0. Settúrslitini vóru 25-19, 25-14 og 25-20. Við sigrinum heldur Dráttur fast í bronsuplássinum í landskappingini.

Seinasti dysturin í meistaradeildini hjá kvinnum hetta vikuskiftið var í Hoyvíkshøllini, og hann var millum KÍF og ÍF. Fuglfjarðarkvinnur vunnu dystin 3-0.

# Áland ella Ynos Mon

**Bert tvær oyggjar eru um boðið at gerast vertir til Oyggjaleikirnar í 2009**


OYGGJALEIKIR
*Jákup Mørk*


Á komandi Oyggjaleikum í Hetlandi skal avgerð takast um, hvar leikirnir skulu haldast um fýra ár.

Upprunaliga vóru tey hesaferð trý um boðið, men Saaremaa, sum annars ongantíð hevur hýst leikunum, hevur nú tikið sítt boð aftur.

Eftir stendur, at tað antin verður í Álandi ella á Ynos Mon at føroysk ítróttarfólk skulu royna seg til ta tíð. Áland hevur eisini áður verið vertur fyri leikunum. Hetta var í 1991. Ynos Mon, sum hoyrir til Wales, hevur ongantíð áður verið vertur.

Bo Frykenstein, sum er formaður í Oyggjaleikanevndini sigur, at nevndin hevur verið og vitjað hjá teimum báðum oyggjunum, sum hava boðið seg fram, og hann tykist ikki vera í iva um, at báðir umsøkjararnir eru væl egnaðir.

– Nevndin var imponerað av, hvussu nógv partarnir leggja fyri í fyrireikingunum. Bæði fyrireikingar og leikvøllir eru á høgum støði.

Í ár verða leikirnir sum kunnugt hildnir á Hetlandi, og um tvey ár er tað so grikska Rhodos, sum skal standa fyri leikunum.

# Sørvingar halda tørn

**SÍ sær út til at hava sett beina kós móti FM-gullinum í meistaradeildini hjá monnum**


FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*


Sørvingar tykjast í ár hava ætlanir um at enda á ovastu rók í landskappingini í flogbólti hjá monnum. SÍ hevur ligið heilt frammi í oddinum í alt ár, og útisigurin á einum av harðastu kappingarneytunum um vikuskiftið var enn ein staðfesting av, at SÍ ætlar sær at verða verandi á oddasessinum.

### Greiður sigur

Í dystinum í Gundadalshøllini millum Fleyr og SÍ var bert spenningur eina løtu. Fleyr vann fyrsta settið 25-19, men so tóku sørvingar yvir. Teir gjørdu bart og vunnu trý tey næstu settini lættliga, og so var sigurin í hús. Settúrslitini vóru 19-25, 25-15, 25-12 og 25-14.

Við sigrinum hava sørvingar næstan útihýst Fleyr úr gullstríðnum, og tí stendur tað nú einans millum SÍ og verandi føroyameistararnar úr Mjølnir. Júst hesi bæði lið hittast eisini í steypafinaluni um lítlan mánað.

Hin dysturin í meistaradeildini hjá monnum um vikuskiftið var í Hoyvíkshøllini, og stóð hann millum heimaliðið Fram og gestirnar úr ÍF. Fuglfirðingar vunnu dystin 3-1, og Fram er tí framvegis isolerað í botninum av meistaradeildini.

Harðastu kappingarneytarnir hjá SÍ, Mjølnir, høvdu frí hetta vikuskiftið.

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 11 | 10 | - | 1 | 31 | 7 | 24 | 11 |
| 2 TB | 11 | 9 | - | 2 | 27 | 13 | 14 | 9 |
| 3 Dráttur | 11 | 5 | - | 6 | 24 | 20 | 4 | 6 |
| 4 ÍF | 11 | 5 | - | 6 | 17 | 18 | -1 | 6 |
| 5 KÍF | 11 | 4 | - | 7 | 13 | 24 | -11 | 6 |
| 6 SÍ | 11 | 0 | - | 11 | 3 | 33 | -30 | 0 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 9 | 8 | - | 1 | 25 | 8 | 17 | 9 |
| 2 Mjølnir | 8 | 6 | - | 2 | 20 | 10 | 10 | 6 |
| 3 Fleyr | 9 | 5 | - | 4 | 19 | 15 | 4 | 5 |
| 4 ÍF | 9 | 2 | - | 7 | 9 | 23 | -14 | 3 |
| 5 Fram | 9 | 1 | - | 8 | 8 | 25 | -17 | 1 |